# ÚTSKRIFT
úr
gerðabók landsstýrisins

Ár 1966, tann 19. januar kl. 10 var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru løgmaður og landsstýrismenninir Kristian Djurhuus og Sámal Petersen.

Til viðgerðar:

1. Býti av fyrisitingini.
   Samtykt var at býta soleiðis:

   Løgmaður: Á lista A í heimastýrislógini nr. 1, 4, 5, 7, undantikið játtanarrætt og yvirhøvur rætt at ráða yvir egnum inntøkum, 8, 12 og 15, undantikið tryggingarfeløg í Føroyum og á lista B: nr. 3 og 5.

   Kristian Djurhuus: Á lista A nr. 6, 7, bert játtanarrætt og yvirhøvur rætt at ráða yvir egnum inntøkum, 13, 14 og 16. Á lista B nr. 2 og 4,

   Sámal Petersen: Á lista A nr. 2, 3, 9, 10, 11 og 15, bert tryggingarfeløg og á lista B nr. 1.

2. Val av varaløgmanni.
   Kristian Djurhuus var valdur varaløgmaður.